# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 20-12-2024

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**
(Ognarviðurskifti, miðsavning, javnseting, økt tilfeingi og landingartreytir)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 2020, § 78 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 186 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 70 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021, løgtingslóg nr. 89 frá 16. mai 2022 og løgtingslóg nr. 155 frá 20. desember 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2, stk. 1, nr. 14, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
“Kvota, ið er sett av til hjáveiðu, royndarfiskiskap o.a., sambært § 50, og rannsóknir, verður ikki roknað uppí heildarkvotu.”

**2.** § 9, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Persónur ella felag, sum í 2018 ella 2019 hevur keypt 3 ella 8 ára rættindi á uppboði, kann við gildiskomu løgtingslógarinnar halda fram og fær í 2020 tillutað veiðirættindi samsvarandi ásetingum í § 19, stk. 5 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, tó verður nøgd rættindahavarans tillutað eftir mørkunum fyri nøgdunum av heildarkvotuni til vinnuligar royndir og verkætlanir við gildiskomu løgtingslógarinnar. Uppboðssølugjaldið, sambært § 19, stk. 7 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, verður bert rindað fyri nøgdina, sum er tillutað samsvarandi § 19, stk. 5 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.”

**3.** § 10, stk. 4 verður strikað.

**4.** § 11, stk. 4, nr. 4 verður orðað soleiðis:
“eigararnir av øllum eginpeninginum, harundir partapeninginum, sum somuleiðis hava allan atkvøðurættin ella avgerðarrættin í felagnum, eru heimahoyrandi í Føroyum og lúka treytirnar í stk. 3.”

**5.** § 12, stk. 3 verður orðað soleiðis:
“Feløg, sum 1. juli 2025 hava rættindi at veiða, kunnu halda fram til 1. januar

2032, hóast ásetingarnar í § 11, stk. 4 og 5, tó skulu treytirnar um ognarviðurskiftini vera loknar, sum feløg vóru fevnd av áðrenn 1. juli 2025. Um vinningsbýti verður lutað út, skal útlutanin til útlendskar eigarar í mesta lagi vera ájavnt við teirra útlendska ognarlut. Tá partabrøv ella kapitalpartar verða seldir, skal keyparin lúka treytirnar í § 11, stk. 4, nr. 4. Avtala um skuld, sum ikki er í samsvari við § 11, stk. 4, nr. 5, kann ikki broytast ella gerast eftir 1. juli 2025."

**6.** Í § 13, stk. 1, nr. 1 og 7 verður "25%" broytt til: "15%".

**7.** Í § 13, stk. 1, nr. 2 og 3 verður "20%" broytt til: "15%".

**8.** Í § 13, stk. 1, nr. 4 verður "30%" broytt til: "15%".

**9.** Í § 13, stk. 1, nr. 5 verður "35%" broytt til: "15%".

**10.** Í § 13, stk. 1, nr. 6 verður "35%" broytt til: "25%".

**11.** Í § 13, stk. 2 verður sum 2. pkt. sett: "Kvotur, lutaðar út eftir § 17 a, verða ikki roknaðar uppí uppgerð av heildarkvotuni sambært stk. 1."

**12.** Í § 13, stk. 4, 1. pkt. verður aftan á "Nærstandandi" sett: "persónur".

**13.** Í § 13, stk. 4 verður sum nýtt 2. og 3. pkt. sett: "Feløg eru nærstandandi, tá sami persónur ella somu persónar, beinleiðis ella óbeinleiðis, eiga 50% ella meira av partapeninginum, harundir eginpeninginum, ella hava 50% ella meira av atkvøðurættinum ella avgerðarrættinum í feløgunum. Feløg eru eisini nærstandandi, tá somu persónar hava avgerandi ávirkan á fíggjarligu ella rakstrarligu viðurskiftini í feløgum gjøgnum leiðslu, nevnd ella á annan hátt."

**14.** Í § 13, stk. 5 verður "1. januar 2020" broytt til: "1. juli 2025".

**15.** § 14 verður strikað.

**16.** Heitið á kapitli 4 verður orðað soleiðis:

"**Býtið av heildarkvotuni**"

**17.** § 15 verður orðað soleiðis:

"**§ 15**. Heildarkvotan av svartkjafti, verður býtt soleiðis:
1) Kvotur, sum eru umlagdar til egnar árskvotur, sambært § 10, stk. 3: 10,4%.
2) Uppboðssølukvotur: 9%.
3) Vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1 og 2: 14,1%.
4) Onnur: 66,5%.

*Stk. 2.* Heildarkvotan av makreli verður býtt soleiðis:
1) Menningarkvotur, sum eru umlagdar sambært § 10, stk. 3: 10,7 %.
2) Uppboðssølukvotur: 5,5%.
3) Vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1 og 2: 9,4%.
4) Onnur: 74,4%.

*Stk. 3.* Heildarkvotan av norðhavssild verður býtt soleiðis:
1) Menningarkvotur, sum eru umlagdar sambært § 10, stk. 3: 9,4%.
2) Uppboðssølukvotur: 5,6%.
3) Vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1 og 2: 10,2%.
4) Onnur: 74,8%."

**18.** § 16 verður strikað.

**19.** § 17 verður strikað.

**20.** Aftan á § 17, men áðrenn yvirskriftina yvir § 18, verður sett:

“**§ 17 a**. Er heildarkvotan størri enn ella ájavnt við ásettu nøgdirnar í nr. 1-3, skal landsstýrismaðurin luta út nøgdina, ið er omanfyri, til tey, ið lúka treytirnar í § 17 b:

1) 385.000 tons av svartkjafti
2) 100.000 tons av makreli
3) 100.000 tons av norðhavssild

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann, hóast stk. 1, gera av ikki at luta út, tá samlaða nøgdin verður mett at vera ov lítil, ella tað er óskynsom gagnnýtsla at luta út sambært stk. 1.

**§ 17 b.** Hesar treytir galda fyri at fáa lut í kvotu sambært § 17 a, stk. 1:

1) Bert fiskifar við veiðiloyvi, og sum við ársenda 2023 hevur rætt til kvotu av svartkjafti, makreli ella norðhavssild, ella fiskifar hesin rættur seinni er fluttur á, kann fáa lut í kvotu sambært § 17 a.
2) Persónur ella felag, sum eigur fiskifar, skal hvør sær ella saman við nærstandandi ella øðrum, beinleiðis ella óbeinleiðis, í mesta lagi hava ræði á 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sambært § 17 a, stk. 1. Kvotur, lutaðar út eftir § 17 a, verða ikki roknaðar uppí, tá avgerast skal, um treytin í 1. pkt. er lokin. Um felag ella persónur eigur minni enn 20% av øllum eginpeninginum í felagi sambært 1. pkt., harundir partapeninginum, umframt minni enn 20% av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, verður ræðið hjá felagnum ella persóninum, sum eigur minni enn 20%, ikki roknað uppí tey 8%. Uppboðssølurættindi sambært § 9 verða javnsett við aðrar egnar árskvotur.”

**21.** Í § 22, stk. 1 verður “samanber tó stk. 4” broytt til: “samanber tó stk. 3”.

**22.** § 31, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
“Egin kvotupartur, egin árskvota og egin hjáveiðikvota kunnu avhendast øðrum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi fyri eitt fiskiár í senn ella endaliga.”

**23.** Í § 31, stk. 2 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
“Kvota latin sambært § 17 a verður ikki roknað uppí, tá nýtslan verður gjørd upp.”

**24.** Í § 36, stk. 4 verður sum nr. 5 sett:
“5) kvotur sambært § 17 a”.

**25.** Aftan á § 41, men áðrenn yvirskriftina yvir § 42, verður sett:

“**§ 41 a.** 50% av veiðuni av svartkjafti, makreli ella norðhavssild, roknað fyri hvørt fiskaslag sær, og gjørd upp 31. desember fyri árið, kann landast og avreiðast uttanlands.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um undantak frá avmarkingini í stk. 1 galdandi fyri ávís fiskasløg, fiskaúrdráttir ella fiskiskap í avmarkað tíðarskeið.
*Stk. 3.* Er veiða landað uttanlands í ósamsvari við stk. 1, skal eigarin av fiskifarinum rinda eitt gjald til landskassan, sum samsvarar við 30% av søluvirðinum av tí nøgd, sum er avreidd uttanlands.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um uppgerð, gjaldfreist og rentu. Gjaldið, saman við rentu og møguligum innkrevjingarkostnaði, kann krevjast inn við panting. TAKS fremur panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum.”

**26.** Í § 49, stk. 1 verður “sambært § 14, stk. 1 og § 15 og rættindum sambært § 17” broytt til: “sum eru settar av at luta út eftir hesi áseting”.

**27.** Í § 49, stk. 2 verður “sambært § 14, stk. 1, §§ 15-16 og rættindi sambært § 17” broytt til: “sum eru settar av at luta út eftir hesi áseting”.

**28.** Í § 49, stk. 4 verður 4. pkt. strikað.

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2025.
*Stk. 2.* § 1, nr. 1-3, 11, 15-20, 23-24, 26-28 koma í gildi 1. januar 2026.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Hetta uppskotið verður lagt fram fyri at fremja mál, samgongan hevur sett sær fyri á fiskivinnuøkinum:

- Reglurnar fyri útlendskan ognarskap verða broyttar soleiðis, at nýggjur útlendskur ognarskapur ikki kann keypa seg inn í føroysk feløg við veiðirættindum, eins og verandi útlendingar ikki kunnu víðka um sín ognarlut ella avgerðarrætt í feløgum fram til 1. januar 2032, tá allur útlendskur ognarskapur skal vera úti úr veiðiliðnum.
- Reglurnar um miðsavning av fiskirættindum verða broyttar soleiðis, at markið, fyri hvussu nógv veiðirættindi einstaklingar ella feløg kunnu ráða yvir, verður lækkað niður í 15% í øllum bólkunum uttan í einum, har tað verður 25%. Sum er, eru mørkini millum 20-35%. Harafturat verða reglurnar broyttar, so at nærstandandi feløg eisini verða roknað undir einum, tá gjørt verður upp, hvussu nógv tey hava ræði á.
- Loyvishavarar í fiskiskapinum eftir svartkjafti, makreli og norðhavssild verða javnsettir, so teir virka undir somu treytum í lógini, tá føroysku kvoturnar broytast. Allar kvotur verða frameftir ásettar við støði í heildarkvotuni og fylgja broytingunum í hesi.
- Nýggj skipan verður soleiðis, at tá heildarkvotan av svartkjafti, makreli ella norðhavssild fer upp um eitt ásett mark, verða nøgdirnar oman fyri markið latnar teimum, sum frammanundan hava lutfalsliga lítlar kvotur.
- Kravið um landing í Føroyum verður broytt soleiðis, at loyvt verður at landa helvtina av veiðuni av svartkjafti, makreli ella norðhavssild uttanlands.

### 1.2. Galdandi lóggáva

*Ognarviðurskifti og útlendskur kapitalur*
Eftir galdandi lóg kunnu útlendingar fram til 1. januar 2032 eiga 25% í feløgum, sum ráða yvir føroysk veiðirættindi. Eftir henda dag skulu útlendingar ikki eiga ella hava avgerðarrætt í hesum feløgum. Skiftisreglur eru tó fyri útlendingar, sum høvdu ræði á føroyskum veiðirættindum við gildiskomu løgtingslógarinnar, sum tó ikki skulu lýsast í hesum sambandi.

Verandi reglur hava við sær, at nýggir útlendingar kunnu keypa seg inn í feløg við føroyskum veiðirættindum, og verandi útlendingar kunnu víðka um sín ognarlut ella avgerðarrætt í hesum feløgum upp til 25% fram til 1. januar 2032.

Í samgonguskjalinum er ásett, at *bert fyritøkur og persónar, búgvandi og skattskyldug í Føroyum, fáa atgongd í veiðiliðnum. Verandi ognarskapur skal hvørva, og nýggjur útlendskur ognarskapur verður ikki loyvdur.*

Fyri at fremja hesa ætlan, er tørvur á at broyta reglurnar í lógini.

*Miðsavning av veiðirættindum*

Í galdandi løgtingslóg eru reglur um miðsavning, sum seta hámark fyri, hvussu nógvar fiskidagar einstaklingar ella feløg kunnu ráða yvir í hvørjum bólki í fiskidagaskipanini uttan í bólki 5. Somuleiðis er hámark sett fyri, hvussu nógv ein kann hava ræði á av botnfiskakvotum í íslendskum sjógvi, botnfiskakvotunum í russiskum sjógvi, norskum sjógvi og við Svalbard og uppsjóvarkvotunum í Norðuratlantshavi. Hámørkini eru millum 20-35%.

Samgongan hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at endurskoða reglurnar um miðsavning av veiðirættindum fyri at forða fyri, at virðini og vinnumøguleikarnir ikki savnast á ov fáum hondum.

Til tess er tørvur á at broyta lógarásetingarnar á økinum.

*Áseting av nøgdum av svartkjafti, makreli og norðhavssild at útluta*

Í verandi skipan eru fýra keldur til kvotur av svartkjafti, makreli og norðhavssild at lata føroyskum skipum (sí talvu 1.1).

Nøgdin til vinnuligar royndir og verkætlanir (§ 14) verður ásett sum ein prosentpartur av *samlaðu føroysku kvotuni*. Tað mesta av hesum eru menningarkvotur frá 2018 og 2019, sum eftir lógini eru lagdar um til vanligar egnar árskvotur. Allar aðrar kvotur í skipanini hava støði í *heildarkvotunum.* Heildarkvota er tað, sum er eftir, tá m.a. kvotur til onnur lond og nøgdin til vinnuligar royndir og verkætlanir í § 14 er drigið frá tøku føroysku kvotuni.

**TALVA 1.1**

**Keldur til kvotur av svartkjafti, makreli og norðhavssild at býta millum føroysk skip**

Í verandi skipan eru fýra høvuðskeldur til nøgdir av svartkjafti, makreli og norðhavssild at býta millum føroysk skip:

1) Vinnuligar royndir og verkætlanir eftir § 14 í løgtingslógini, har tað mesta fevnir um menningarkvotur frá 2018 og 2019, men sum nú eru lagdar um til vanligar egnar árskvotur. Hendan nøgdin verður roknað sum ein prosentpartur *av tøku føroysku kvotuni.*
2) Vinnuligar royndir og verkætlanir eftir §§ 15 og 16 í løgtingslógini verða roknaðar sum ein prosentpartur av *heildarkvotuni*. Hesar nøgdirnar verða saman við tí, sum ikki er umlagt í § 14, lutaðar út eftir ásetingunum í § 49 til vinnuligar royndir, ítøkilig skipakeyp og ískoytiskvotur. Tað mesta av hesum er lagt um til egnar árskvotur.

3) Kvotur, keyptar á uppboði í 2018 ella 2019, sum 3 ella 8 ára rættindi, verða roknað sum ein prosentpartur av heildarkvotuni. Hesi rættindi hava støðu sum uppboðsrættindi í gildistíðini. Tá gildistíðin er runnin, verða rættindini útlutað sum egnar árskvotur.

4) Kvotur til onnur, t.e. kvotur av svartkjafti, makreli ella norðhavssild, ið eru eftir, tá lógarásettu nøgdirnar eru tiknar av heildarkvotuni.

Hesar ásetingar í lógini gera, at tá árligu uppsjóvarkvoturnar broytast, ávirkar hetta aktørar ymisk alt eftir, hvørjari lógargrein rættindini hava sín uppruna í. Kvoturættindi, ið stava frá umløgdum menningarkvotum, vera til dømis ikki ávirkaðar av, hvussu nógv Føroyar lata av uppsjóvarfiski í kvotabýtinum við onnur lond. Tað vera harafturímóti allar aðrar kvotur í skipanini.

Í galdandi lóg eru eisini ásetingar, sum gera, at árligu nøgdirnar av norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir (§§ 15 og16), ikki verða ásettar eftir sama leisti sum fyri svartkjaft og makrel.

Fyri øll trý fiskasløgini eru tað heildarkvoturnar í 2020, sum eru avgerandi fyri, hvussu árligu nøgdirnar av svartkjafti, makreli og norðhavssild at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir fylgja broytingunum í heildarkvotuni tey eftirfylgjandi árini. Avgerandi er, um heildarkvotan í 2020 var undir ella oman fyri hesi lógarásettu mørk:

1) Svartkjaftur: 350.000 tons
2) Makrelur: 90.000 tons
3) Norðhavssild: 85.000 tons

Fyri svartkjaft og makrel var heildarkvotan í 2020 undir markinum, og broytingar í árligu nøgdunum at svartkjafti og makreli at luta út hava tí verið stillaðar í sama lutfalli, sum heildarkvotan broytist.

Hinvegin var heildarkvotan av norðhavssild í 2020 oman fyri markið í lógini á 85.000 tons. Tá heildarkvotan í 2020 er oman fyri markið, sigur verandi lóg, at nøgdin at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir skal ásetast soleiðis, at fyrst verða roknað 8,7% av 85.000 tonsum. Síðani verður øll nøgdin, sum er oman fyri markið og upp til heildarkvotuna í 2020 løgd afturat, eins og eitt lutfall av kvotuni, sum er oman fyri heildarkvotuna í 2020. Hetta merkir, at nøgdin, sett av til norðhavssild, fylgir ikki broytingunum í heildarkvotuni, men broytist eftir, hvør árliga heildarkvotan av norðhavssild er í mun til markið á 85.000 tons og heildarkvotuna í 2020.

Tikið samanum hava verandi lógarásetingar við sær, at aktørarnir í fiskiskapinum eftir svartkjafti, makreli ella norðhavssild ikki eru undir somu lógartreytum, tá samlaða føroyska kvotan broytist. Í øllum øðrum lutum eru aktørarnir annars undir somu lógartreytum. Tað allar mesta av svartkjaftinum, makrelinum og norðhavssildini verður tillutað skipunum sum egnar árskvotur við teimum rættindum og skyldum, ið galda fyri slík rættindi.

Fyri at fremja orðingina í samgonguskjalinum um at javnseta aktørarnar í uppsjóvarvinnuni, er tørvur á at tillaga lógina, so at allar kvotur av svartkjafti, makreli og norðhavssild frameftir verða ásettar eftir sama leisti.

Harafturat verður mett, at hesin munur, sum er í lógargrundarlagnum, ikki heilt samsvarar við ta skipan við kvoturættindum, ið allýsingarnar av ymiskum kvotuhugtøkum í lógini leggja upp til. *Heildarkvotan* er allýst sum tað, ið er eftir, tá tað, vit lata øðrum londum og umlagdar menningarkvotur, er drigið frá. Felags kvotupartur ella *felags árskvota* er tann parturin av heildarkvotuni, ið rættindahavarar ella ein bólkur av fiskiførum undir einum hevur rætt til at veiða. Egin kvotupartur ella *egin árskvota* er tann partur av felags árskvotuni, ið eigari av fiskifari hevur rætt til at veiða. Eftir hesum kunnu rættindi at fiska svartkjaft, makrel ella norðhavssild, sum verða útlutað sum egnar árskvotur, illa hava støði í øðrum enn heildarkvotuni.

*Kravið um landing og avreiðing í Føroyum*
Eftir verandi lóg skal øll veiða hjá føroyskum skipum landast og avreiðast um bryggjukant í Føroyum. Tó kunnu 15% av veiðuni fyri hvørt fiskaslag landast og avreiðast uttanlands. Heimilað er at áseta reglur um, hvørji fiskasløg, fiskaúrdráttir ella fiskiskapur heilt ella lutvíst í avmarkað tíðarskeið er undantikin landingarkravinum, tá umstøður, so sum sølumøguleikar í Føroyum, møguleikar at virðisøkja fiskin og fjarstøða frá fiskileiðum, tala fyri tí. Í kunngerð er ásett, hvørji fiskasløg eru meira varandi undantikin. Harumframt eru tíðaravmarkað undantøk givin fyri uppsjóvarfisk, serliga svartkjaft, vegna vantandi móttøkukapasitet í Føroyum í háárstíðini. Í lógini er eisini heimild eftir umsókn at geva undantak í ítøkiligum førum.

Tørvur er á broytingum, so serligar reglur verða gjørdar fyri svartkjaft, makrel og norðhavssild um landing og avreiðing uttanlands.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er

- At broyta reglurnar, so at útlendskur ognarskapur og kapitalur ikki kann koma inn í ella økjast í føroyskum feløgum við veiðirættindum fram til 2032, tá hann skal vera heilt úti úr veiðiliðnum.
- At broyta reglurnar um miðsavning av fiskirættindum soleiðis, at markið fyri, hvussu nógv veiðirættindi einstaklingar ella feløg kunnu ráða yvir, verður lækkað niður í 15% í øllum bólkunum. Sum er, eru mørkini millum 20-35%. Harafturat verða reglurnar broyttar til eisini at fevna um nærstandandi feløg. Reglurnar vera tó bert galdandi frameftir.
- At broyta lógina, so at nøgdirnar av uppsjóvarfiski at býta millum føroysk skip verða ásettar á sama grundarlagi, og at allir aktørarnir í uppsjóvarfiskiskapinum á tann hátt eru undir somu lógartreytum.
- At seta í verk eina skipan, sum ber í sær, at tá heildarkvotan av makreli, svartkjafti og norðhavssild fer upp um eitt ásett mark, verður nøgdin, sum er omanfyri, tillutað teimum sum frammanundan hava lutfalsliga lítlar kvotur.
- At broyta kravið um landing í Føroyum, so at skip fáa møguleika at landa upp til helvtina av veiðuni av svartkjafti, makreli ella norðhavssild uttanlands.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið snýr seg um hesar høvuðsbroytingar í sjófeingislógini:

1) *Útlendskur ognarskapur og kapitalur*

Skotið verður upp, at reglurnar fyri útlendskan ognarskap verða broyttar soleiðis, at nýggjur útlendskur ognarskapur ikki kann keypa seg inn í føroysk feløg við veiðirættindum, eins og verandi útlendingar ikki kunnu víðka um sín ognarlut ella avgerðarrætt í feløgum fram til 1. januar 2032, tá allur útlendskur ognarskapur skal vera úti úr veiðiliðnum.

Eftir galdandi lóg kunnu útlendingar, fram til 1. januar 2032, eiga 25% í feløgum, sum ráða yvir føroyskum veiðirættindum. Eftir henda dag skulu útlendingar ikki eiga ella hava avgerðarrætt í hesum feløgum.

Verandi reglur hava við sær, at nýggir útlendingar kunnu keypa seg inn í feløg við føroyskum veiðirættindum, og verandi útlendingar kunnu víðka um sín ognarlut ella avgerðarrætt í hesum feløgum upp til 25% fram til 1. januar 2032.

Skotið verður upp at broyta reglurnar, so hetta ikki longur ber til. Ein skiftisskipan verður tó galdandi til 1. januar 2032, sum loyvir verandi útlendingum at halda fram, men hesir kunnu ikki økja sín ognarlut ella avgerðarrætt, og nýggir útlendingar kunnu ikki keypa part í feløgum, sum hava føroysk veiðirættindi.

Ætlanin hevur støði í samgonguskjalinum, har ásett er, at *bert fyritøkur og persónar, búgvandi og skattskyldug í Føroyum, fáa atgongd í veiðiliðnum. Verandi ognarskapur skal hvørva, og nýggjur útlendskur ognarskapur verður ikki loyvdur.*

Hugsanin er, at núgaldandi reglur kunnu hava við sær nýggjan og øktan útlendskan ognarskap í føroysku fiskiveiðuni, og ein tílík gongd kann gera tað avbjóðandi at gjøgnumføra ætlanina um, at hesin ognarskapur skal vera úti úr føroyskari fiskiveiðu í 2032.

2) *Miðsavning av veiðirættindum*

Skotið verður upp, at reglurnar um miðsavning av fiskirættindum verða broyttar, so at markið fyri, hvussu nógv veiðirættindi einstaklingar ella feløg kunnu ráða yvir, verður lækkað niður í 15% í øllum bólkunum, uttan í einum bólki, har tað verður 25%. Sum er, eru mørkini millum 20-35%. Harafturat verða reglurnar broyttar, soleiðis at nærstandandi feløg eisini verða roknað við, tá gjørt verður upp, hvussu nógv ein hevur ræðið á.

Í samgonguskjalinum stendur, at reglurnar um miðsavning skulu endurskoðast til tess at forða fyri, at virðini og vinnumøguleikarnir ikki savnast á ov fáum hondum. Ætlanin er tí at broyta hesar reglur.

Ætlanin er, at markið skal setast niður í 15% fyri allar bólkarnar, tó ikki fyri botnfiskin í russiskum sjógvi, norskum sjógvi og við Svalbard. Her verður prosentið lækkað úr 35% til 25%.

Sambært verandi lóg eru eisini ásett mørk fyri, hvussu nógv nærstandandi persónar kunnu ráða yvir, men tílíkar reglur eru ikki fyri feløg. Hetta hevur við sær, at rættindi kunnu miðsavnast hjá fáum feløgum. Ætlanin er tí at broyta lógina, so nærstandandi feløg eisini eru fevnd av ásettu mørkunum.

Broytingarnar verða tó bert galdandi frameftir, og verandi persónar og feløg varðveita tey rættindi, sum tey ráða yvir áðrenn lógarbroytingina.

Grundgevingarnar fyri at hava reglur, sum avmarka ræðisrættin á veiðirættindunum, eru fleiri. Nakrar grundgevingar eru, at landsstýrið vil tryggja ein fjølbroyttan og breiðan eigaraskara í vinnuni, og at tað er gagnligt við kapping í vinnuni. Tað er eisini ein grundgeving at forða fyri, at ognarskapurin í fiskivinnuni verður savnaður á fáum hondum, sum kann hava við sær, at valdið í vinnulívinum somuleiðis verður savnað hjá nøkrum fáum fyritøkum.

Gongdin seinastu árini verður mett at vera í andsøgn við hesar grundgevingar. Sannlíkt er eisini, at miðsavningin fer at gerast enn størri komandi árini. Neyðugt er tí at tillaga núverandi reglur. Skotið verður tí upp at gera tær broytingar, sum eru lýstar her.

3) *Somu lógartreytir fyri aktørarnar í fiskiskapinum eftir uppsjóvarfiski*
Skotið verður upp, at allar nøgdir av svartkjafti, makreli og norðhavssild frameftir verða roknaðar av heildarkvotuni. Eftir galdandi lóg verða nøgdirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir ásettar tvær staðni í lógini og á hvør sínum grundarlagi. Ein partur verður ásettur sum prosentpartur av tøku føroysku kvotuni, meðan ein annar partur verður ásettur við støði í heildarkvotuni. Allar aðrar kvotur í skipanini verða roknaðar av heildarkvotuni.

Broytingin í uppskotinum ger samanumtikið, at øll, sum hava egnar árskvotur av svartkjafti, makreli og norðhavssild, fara at vera undir somu lógartreytum. Allar kvotur fara at vera roknaðar av heildarkvotuni og fara at flyta seg í sama lutfalli, sum heildarkvotan broytist. Skipanin verður samstundis greiðari og harvið lættari at gjøgnumskoða og at umsita.

4) *Økt tilfeingi av svartkjafti, makreli og norðhavssild*
Skotið verður upp, at ein serlig skipan verður gjørd soleiðis, at tá heildarkvotan av svartkjafti, makreli ella norðhavssild fer upp um eitt ásett mark, skal landsstýrismaðurin kunna luta út nøgdirnar, sum eru oman fyri markið til tey, sum frammanundan hava lutfalsliga lítlar kvotur - minni enn 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær. Kvotur, latnar eftir hesi skipan, eru galdandi fyri eitt fiskiár.

Nýggja skipanin í uppskotinum gerst virkin, tá heildarkvotan fer upp um hesi mørk:

1) 385.000 tons av svartkjafti
2) 100.000 tons av makreli
3) 100.000 tons av norðhavssild

Mørkini taka støði í mørkunum í galdandi lóg. Tó so, at atlit er tikið at kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 14 í galdandi lóg, sum við broytingini eru partur av heildarkvotuni.

Avgerandi fyri, um nýggja skipanin gerst virkin er, hvussu samlaðu føroysku kvoturnar av svartkjafti, makreli ella norðhavssild fara at vera næstu árini. Og tað veldst serliga um, hvussu stovnarnir eru fyri, hvussu støðan er í samstarvinum millum strandarlondini, og hvussu nógv av samlaðu føroysku kvotunum verður brúkt í árliga kvotuumbýtinum við onnur lond.

6) *Landingarkrav til uppsjóvarfisk í Føroyum*

Kravið um landing í Føroyum verður broytt soleiðis, at uppsjóvarskip fáa ein lógartryggjaðan rætt til at landa og avreiða upp til helvtina av veiðuni av svartkjafti, makreli ella norðhavssild uttanlands. Við hesum verður ein ávísur skilnaður gjørdur í reglunum um landing fyri botnfisk og reglurnar fyri uppsjóvarfisk. Samstundis kann broytingin stuðla undir kapping um fiskin.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá .........
.................
...................
....................

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið, um at linka kravið um at landa og avreiða svartkjaft, makrel og norðhavssild í Føroyum, ger sølumøguleikarnar hjá skipunum rúmari og kann hava týdning fyri søluprísin. Hetta kann ávirka hýrur og inntøkur hjá reiðarínum og harvið eisini inntøkurnar hjá landskassanum av persónsskatti og partafelagsskatti. Avreiðingarprísirnir á uppsjóvarfiski hava eisini týdning fyri inntøkurnar hjá landinum av veiðigjaldi.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur. Fyri landið kunnu broytingarnar vera gagnligar, tí við broytingunum er eisini miðað eftir at gera lógarverkið einfaldari og minni tíðar- og orkukrevjandi at umsita.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna.

Herðingin av reglunum um útlendskan ognarskap og kapital soleiðis, at nýggjur útlendskur eginpeningur ella verandi útlendingar ikki kunnu víðka um ognarskapin í tíðarskeiðinum fram til 2032, tá allur útlendskur eginpeningur og avgerðarrættur skal vera úti úr vinnuni, kann ávirka møguleikarnar hjá vinnuni at fíggja íløgur og virksemi annars í hesum tíðarskeiðinum.

Atgongd til fígging, so sum útlendska eginfígging, kann vera gagnlig fyri vinnuligan vøkstur og íløgur í Føroyum. Hetta er kanska serliga viðkomandi í byrjanini hjá nýggjum feløgum ella nýggjum verkætlanum í vinnuni á sjónum. Dømi eru um, at nýggj feløg eru byrjað innan uppsjóvarvinnuna, har partur av partapeninginum hevur verið útlendskur.

Hinvegin eru tað í løtuni lutfalsliga fá feløg í vinnuni á sjónum, sum hava útlendska eginfígging, og dømi eru um feløg, sum hava havt útlendska eginfígging, sum er seld úr feløgunum seinastu árini, og hesi feløg hava nú bert føroyskar partaeigarar. Partar av vinnuni

hava havt stór fíggjarlig avlop í mong ár, og mett verður, at útlendsk eginfígging nýtist ikki at vera ein týðandi fyritreyt fyri vinnuligari menning og vøkstri í føroyska fiskiflotanum.

Herðingin av reglunum um, hvussu stóran part av samlaðu veiðirættindunum ein persónur ella felag kann hava ræði á, og broytingin við, at nærstandandi feløg eisini verða tald við, kann broyta fyritreytirnar fyri vinnuliga virkseminum. Hvørjar ítøkiligu avleiðingarnar verða, er tó ilt at meta um. Sum heild hevur broytingin við sær, at har fara at vera persónar ella feløg, sum ikki kunnu vaksa meira um virksemið, ella ikki kunnu vaksa eins nógv og áðrenn broytingina. Broytingin hevur eisini við sær, at feløg fara at verða fevnd av ásetingini um nærstandandi feløg, og tí ikki kunnu vaksa meira. Broytingin fer sostatt at hava fíggjarligar avleiðingar fyri ávísar persónar og feløg, sum verða fevnd av markinum fyri miðsavning eftir lógarbroytingina. Broytingin kann tó eisini hava jaligar avleiðingar fyri vinnuna. At avmarka miðsavningina av fiskirættindunum kann stuðla undir, at fleiri fáa møguleika at gerast partur av vinnuni, og at smærri aktørar kunnu gerast størri.

Broytingin fyri at javnseta aktørarnar, so at allar nøgdir at útluta av svartkjafti, makreli og norðhavssild verða ásettar eftir somu grundreglu í løgtingslógini, ber í sær eitt skifti, har tað illa ber til at tryggja, at nøgdirnar at tilluta hvørjum kvotubólki vera lutfalsliga neyvt tær somu sum í verandi lóg. Tað er tó torført í neyvum tølum at siga, hvussu broytingin kemur at ávirka. Avgerandi í øllum er, hvussu heildarkvoturnar fara at vera frameftir. Og tann spurningurin er knýttur at óvissuni um, hvussu samlaðu føroysku kvoturnar av svartkjafti, makreli og norðhavssild fara at vera, og hvussu nógv av hesi kvotu verður brúkt í kvotuumbýti við onnur lond tey næstu árini.

Ein partur av uppskotinum er nýggj skipan, sum sigur, at tá heildarkvotan av svartkjafti, makreli ella norðhavssild fer upp um eitt ásett mark, skal nøgdin oman fyri markið latast teimum, ið hava ræði á lutfalsliga smáum uppsjóvarkvotum. Hetta kann eisini hava avleiðingar fyri vinnuna. Verður nýggja heimildin virkin, fer hetta at gagna teimum, sum frammanundan hava lutfalsligar lítlar kvotur, men ger samstundis, at onnur - alt annað óbroytt - fáa minni enn tey høvdu fingið, um tey fingu lut í øllum vøkstrinum í heildarkvotuni. Hvørjar ítøkiligu avleiðingarnar verða í tølum, er tó torført at meta um, tí eisini hetta er knýtt at óvissuni um, hvussu føroysku kvoturnar fara at hátta seg frameftir.

Uppskotið, sum gevur uppsjóvarskipum ein lógartryggjaðan rætt at landa og avreiða upp til helvtina av veiðuni av svartkjafti, makreli og norðhavssild uttanlands, kann hava týdning fyri avreiðingarprísin, tí kappingin um veiðuna verður størri. Tað, at linka treytirnar fyri landing í Føroyum fyri uppsjóvarfisk, kann hinvegin gera, at lutfalsliga minni av svartkjafti, makreli ella norðhavssild kemur upp á land til virkingar í Føroyum. Hetta veldst tó nógv um kappingarførið hjá føroyskum keyparum.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum. Partar av uppskotinum kunnu tó fáa avleiðingar fyri økir í landinum, har fyritøkur eru, ið fáa ella ikki fáa møguleika at vaksa, tí reglurnar um miðsavning verða herdar.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Millumtjóðasáttmálar eru ikki á teimum økjum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, harundir Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Heldur ikki verður mett, at uppskotið er í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at uppskotið elvir til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ásetingar um gjøld, tá skip avreiða meira uppsjóvarfisk uttanlands enn reglurnar loyva. Tá skal eigarin av fiskifarinum rinda eitt gjald til landskassan, ið samsvarar við 30% av tí nøgd, ið er avreidd uttanlands.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið gevur landsstýrismanninum heimild at útluta svartkjaft, makrel og norðhavssild eftir einum nýggjum og øðrvísi leisti, tá heildarkvoturnar fara upp um eitt ásett mark. Uppskotið leggur ikki nýggjar heimildir til stovnar undir landsstýrinum ella til annan landsstýrismann, stovn ella kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Til nr. 1**
*§ 2, stk. 1, nr. 14, 2. pkt.*
Broytingin er ein fylgibroyting av broyting nr. 15, sum strikar § 14. Nøgdirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir eftir galdandi § 14, verða eftir galdandi løgtingslóg roknaðar sum ein prosentpartur av allari føroysku kvotuni, men verða frameftir roknaðar av heildarkvotum. Allýsingin av "heildarkvota" verður broytt samsvarandi.

**Til nr. 2**
*§ 9, stk. 1*
Fylgibroyting av broyting nr. 17, har § 15 verður broytt. Ásetingin vísir til tvey punktum í § 15, og tá innihaldið í § 15 verður fullkomiliga broytt, er neyðugt at broyta tilvísingina til hesa grein. Talan er tó ikki um innihaldsligar broytingar. Tilvísingin í § 9, stk. 1, síðsta liði, verður broytt til ein upplýsandi tekst ístaðin, so hann enn sigur tað sama, tó uttan at nevna § 15. Hendan ásetingin hevur tó ongan týdning longur, tí hon er ein skiftisregla, sum hevur havt sín virknað. Hon hongur tó saman við øðrum punktum í § 9, stk. 1. § 9, stk. 1, 4. pkt. verður strikað. Ásetingin sigur, hvussu uppboðssølukvotur stillast við støði í broytingum í heildarkvotuni. Ásetingin kann strikast, tí hon hevur ongan týdning í sjálvum sær frameftir.

**Til nr. 3**
*§ 10, stk. 4*
Fylgibroyting av broyting nr. 17, har § 15 verður broytt. Núverandi ásetingin snýr seg um, hvussu parturin, ið verður settur av til vinnuligar royndir og verkætlanir, verður stillaður, um landsstýrismaðurin leggur menningarkvotur um til egnar árskvotur. Øll skipanin verður broytt við, at § 14 verður strikað og við nýggju ásetingunum í § 15 b og frameftir. Núverandi áseting hevur tí ongan virknað longur og verður strikað.

**Til nr. 4**
*§ 11, stk. 4, nr. 4*
Skotið verður upp at broyta ásetingina soleiðis, at bert føroyingar kunnu eiga og ráða yvir feløgum við veiðirættindum sambært løgtingslógini.

Sambært verandi áseting kunnu útlendingar eiga og hava ræði á 25% av feløgunum við rættindum sambært løgtingslógini fram til 1. januar 2032. Tá skal allur útlendskur ognarskapur vera úti. Ásetingin hevur við sær, at verandi útlendskir eigarar kunnu vaksa upp til 25%, og nýggir útlendskir eigarar kunnu koma inn í feløg við veiðirættindum fram til 1. januar 2032.
Hetta skal ikki longur bera til. Tá lógarbroytingin kemur í gildi, kunnu útlendingar ikki longur eiga í feløgum, sum hava veiðirættindi sambært løgtingslógini. Tó verður ein skiftisregla, sum loyvir teimum, sum hava rættindi við gildiskomu løgtingslógarinnar, at halda fram til 2032. Henda broyting fær sostatt virknað frameftir.

**Til nr. 5**
*§ 12, stk. 3*
Pkt. 1.
Viðvíkjandi 1. pkt. í greinini verður núgaldandi skiftisregla broytt, so hon fevnir um tey feløg við útlendskum ognarskapi, sum hava rættindi, tá løgtingslógin fær gildi. Hesi kunnu halda fram við tí ognarluti, tey hava hendan dagin. Talan er sostatt um ein nýggjan skeringsdag. Mørkini fyri útlendskum ognarskapi hava verið broytt fleiri ferðir seinastu árini, og talan kann tí vera um útlendskan ognarskap, sum er ymiskur til støddar. Hendan greinin ásetir eina skiftisskipan fyri hesi feløg, sum ikki lúka ásetingina í § 11, stk. 4, nr. 4 í løgtingslógini um, at bert føroyingar kunnu eiga eginpeningin, harundir partapeningin, sum somuleiðis eiga allan atkvøðurættin og avgerðarrættin í felagnum, tá løgtingslógin kemur í gildi. Nú kemur allur útlendskur ognarskapur inn í tíðina eftir broytingina við tí stødd, hann er, tá løgtingslógin fær gildi, og kann halda fram.

Feløg skulu tó lúka tær treytir, sum vóru fyri útlendskan ognarskap áðrenn broytingina. Hetta merkir, at um onkur er komin yvirum við størri ognarluti, enn tey høvdu rætt til, sleppa tey ikki at varðveita tann partin, sum er í ósamsvari við treytirnar, sum vóru galdandi áðrenn.

Feløg við útlendskum ognarskapi kunnu virka sum vanligt, undir hesum keypa rættindi o.s.fr., men tann útlendski ognarluturin skal ikki vaksa, hvørki lutfalsliga ella í vavi, og nýggir útlendingar kunnu ikki koma inn ístaðin fyri ella afturat verandi.

Um útlendski ognarluturin minkar, kann hann ikki vaksa aftur.

Pkt. 2.
Hetta punktið verður umorðað. Eftir verandi lóg skal føroyski parturin í minsta lagi fáa 2/3 av vinningsbýtinum, sum verður útlutað. Hetta verður nú hert og nágreinað, so útlendingar í mesta lagi bert fáa tað, sum samsvarar við teirra ognarlut. Hetta merkir, at um teir eiga 25%, so fáa teir í mesta lagi 25% av vinningsbýtinum.

Pkt. 3. stendur óbroytt.

Pkt. 4.

Sambært verandi áseting kann útlendski ognarluturin ongantíð verða hægri, enn hann var við gildiskomu lógarinnar. Skotið verður upp at strika hesa áseting.

Ásetingin kom inn við broytingaruppskoti frá Vinnunevndini til upprunauppskotið til løgtingslógina. Ásetingin snýr seg um feløg, har útlendski ognarluturin er yvir ¼, men undir ⅓ og skal tryggja, at hesin ognarlutur ikki kann vaska við keyp og sølu av feløgum við útlendingum inni. Nú verður støðan tann, at útlendingar sleppa at vera inni við ognarlutinum, sum er, tá løgtingslógin fær gildi, men útlendski ognarluturin kann ikki økjast eftir hetta. Um eitt felag keypir eitt annað felag við útlendskum ognarskapi, heilt ella lutvíst, so fær keypandi felagið nýggjar ella fleiri útlendingar inn. Hetta er ikki í samsvari við nýggja pkt. 1 í hesi áseting, og skotið verður tí upp at strika hesa áseting, sum ikki hevur sjálvstøðugan týdning eftir lógarbroytingina.

Pkt. 5.
Eftir lógarbroytingina skulu feløg aftur ikki hava skuld, sum er ábyrgdarpeningur, til feløg við útlendskum ognarskapi. Vísast skal til § 11, stk. 4, nr. 5. Men avtalur eru longu gjørdar, og skotið verður nú upp, at hesar avtalur ikki skulu broytast, og nýggjar avtalur skulu ikki gerast eftir, at løgtinglógin kemur í gildi.

**Til nr. 6-10**
*§ 13, stk. 1*
Reglurnar um miðsavning av fiskirættindum verða broyttar soleiðis, at markið fyri, hvussu nógv veiðirættindi einstaklingar ella feløg kunnu ráða yvir, verður lækkað niður í 15% í øllum bólkunum, uttan í bólkinum fyri botnfiskin í russiskum sjógvi, norskum sjógvi og við Svalbard, har prosentið verður lækkað úr 35% til 25%. Orsøkin til, at prosentið ikki verður lækkað til 15% í hesum bólki, eins og í hinum bólkunum, er, at mett verður, at grundarlag er ikki fyri fleiri aktørum í hesum bólki, og tað undir givnu fyritreytunum ikki stuðlar undir skynsaman rakstur at lækka miðsavningarmarkið niður í 15%.

**Til nr. 11**
*§ 13, stk. 2*
Ásetingin verður tillagað soleiðis, at kvotur, lutaðar út sambært § 17 a í uppskotinum, ikki telja við í uppgerð av miðsavning. Í § 17 a er talan um rættindi, sum eru avmarkað til eitt fiskiár, og mett verður, at hesi ikki eiga at ávirka, hvussu nógv einstaki rættindahavarin hevur ræðið á frá ári til ár. Um kvota sambært § 17 a verður íroknað í uppgerð um miðsavning, hevur tað eisini við sær, at teir aktørar, sum eru stórir, eiga minni lutfalsliga, tí samlaða nøgdin verður størri. Møguliga kann onkur tá eisini lúka treytir fyri at fáa lut í kvotu sambært § 17 a, sum eftir endamálinum ikki skal vera við í hesum skara.

**Til nr. 12**
*§ 13, stk. 4, 1. pkt.*
Av tí, at nýggj áseting verður sett inn um nærstandandi feløg, verður skotið upp at nágreina, at fyrsta punktið í ásetingini snýr seg um persónar.

**Til nr. 13**
*§ 13, stk. 4, 2. og 3. pkt.*
Núverandi § 13, stk. 4 ásetir, nær persónar eru nærstandandi. Nú verður skotið upp eisini at áseta, nær feløg eru nærstandandi, og teirra ræði á veiðirættindum harvið skal roknast undir einum. Feløg eru nærstandandi, tá ein persónur ella somu persónar hava tað ræði, sum er nevnt í ásetingini í tveimum ella fleiri feløgum. Ræðið kann vera at eiga 50% ella meira av

partapeninginum, harundir eginpeninginum, men tað kann eisini vera at hava 50% av atkvøðurættinum ella avgerðarrættinum í feløgunum. Ásetingin er orðað eins og ásetingin viðvíkjandi ognarviðurskiftunum. Talan kann eisini vera um óbeinleiðis ræði. Hugtakið skal skiljast eins og hugtakið óbeinleiðis ræði í stk. 1.

Hugtakið avgerðarrættur er eitt rættiliga breitt hugtak, sum metast skal um í hvørjum einstøkum føri. Í 3. pkt. verður tó neyvari ásett, at ein ávísur avgerðarrættur í øllum førum er fevndur av ásetingini. Hetta merkir tó ikki, at 3. pkt. endaliga ásetir vavið av avgerðarrætti, sum er fevndur av ásetingini. Tað kunnu tí vera støður, sum ikki eru fevndar av 3. pkt., men sum hóast hetta kunnu vera fevndar av avgerðarrættinum í 2. pkt.

3. pkt. fevnir um at hava avgerandi ávirkan á fíggjar- ella rakstrarligu viðurskiftini í feløgum gjøgnum leiðslu ella nevnd ella á annan hátt.

**Til nr. 14**
*§ 13, stk. 5*
Sambært verandi áseting kann virksemið halda fram við tí miðsavning, sum var áðrenn 1. januar 2020, men tað kann ikki økjast. Nú verða miðsavningarreglurnar herdar, og tørvur er tí á eini nýggjari reglu um skiftið inn í tíðina, eftir at nýggja reglan fær gildi. Ætlanin er, at virksemið skal kunna halda fram við tí miðsavning av rættindum, sum var, áðrenn løgtingslógin kemur í gildi, men tað kann ikki økjast. Ásetingin verður ikki broytt innihaldsliga annað enn, at skeringsdagurin nú verður dagurin, tá løgtingslógin kemur í gildi.

**Til nr. 15**
*§ 14*
Eftir galdandi § 14, skulu 8,5% av *tøku føroysku kvotunum* av svartkjafti, makreli og norðhavssild setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Menningarkvotur, sum vórðu latnar í 2018 og 2019 eftir løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi, verða roknaðar av hesi nøgdini í verandi § 14. Eftir § 10, stk. 3 í sjófeingislógini, skuldu tey, ið høvdu menningarkvotur, í seinasta lagi 1. januar 2022 hava lagt hesar kvotur um til egnar árskvotur.

Hetta lógaruppskotið leggur upp til, at frameftir verða allar egnar árskvotur og kvotur, ið skulu setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir, roknaðar sum ein partur av *heildarkvotuni*. Uppskotið ber í sær, at av samlaðu nøgdini í verandi § 14, verður tað, sum upprunaliga eru menningarkvotur, ið eru lagdur um til vanligar egnar árskvotur, roknað sum ein prosentpartur av heildarkvotuni. Tað, sum ikki er lagt um, fer í puljuna til vinnuligar royndir og verkætlanir at luta út eftir § 49 í lógini.

Tí hevur § 14 ikki týdning longur og verður strikað.

**Til nr. 16**
Skotið verður upp at dagføra heitið á kapitli 4, so tað betri endurspeglar innihaldið í broyttu lógargreinunum.

**Til nr. 17**
*§ 15*
Hendan broytingin í § 15 hevur sum endamál at javnseta aktørarnar í fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski, so at allar kvotur verða ásettar á sama lógargrundarlagi.

Verandi § 15 ásetir, hvussu nógv prosent av heildarkvotunum av svartkjafti, makreli og norðhavssild verður sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir at útluta eftir % 49. § 16 ásetir, hvussu hesar kvoturnar broytast, tá heildarkvoturnar broytast. §§ 15 og 16 hava eisini týdning fyri tær kvotur, sum í 2018 og 2019 vóru seldar sum uppboðssølukvotur, tí ásett er í galdandi § 9, at hesar verða tillutaðar eftir mørkunum í § 15, stk. 1 og at tær flyta seg við broytingum í heildarkvotuni, eins og rættindi tillutað eftir § 15, stk. 1.

Yvirskipað ber hetta uppskotið í sær, at frameftir vera allar nøgdir av svartkjafti, makreli og norðhavssild at býta út á føroysk skip, ásettar við støði í heildarkvotuni og fara at broytast í sama lutfalli, sum árliga heildarkvotan broytist.

Ítøkiliga er talan um tvær broytingar samanborið við galdandi reglur.

Tann fyrra snýr seg um at áseta, hvussu stórur prosentpartur av heildarkvotunum (upp til markið í § 17 a) av svartkjafti, makreli og norðhavssild verður settur av sum felags árskvotupartur til hesar fýra høvuðsbólkar av rættindahavarum:

1) Fiskifør, ið hava egnar árskvotur av svartkjafti, makreli ella norðhavssild, sum stava frá menningarkvotum útlutaðar í 2018 og 2019, og sum eftir galdandi lóg eru partur av nøgdini sett av eftir § 14, tað vil siga sum ein prosentpartur av samlaðu føroysku kvotuni. Av samlaðu nøgdini í § 14, er tað mesta menningarkvotur, sum eru lagdar um til egnar árskvotur sambært § 10, stk. 3 í løgtingslógini. Tað, ið ikki er lagt um, fer í puljuna til vinnuligar royndir og verkætlanir at luta út eftir § 49.

2) Fiskifør, ið hava kvotur keyptar á uppboði í 2018 ella í 2019 sum 3 ella 8 ára rættindi. Hesar kunnu eftir skiftisregluni í § 9 halda fram, til gildistíðin er runnin, og verða tá lagdar um og fáa støðu sum vanligar egnar árskvotur.

3) Fiskifør, sum hava lut í kvotum, settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir eftir galdandi §§ 15 og 16 og § 14, og lutaðar út eftir § 49 til m.a. ítøkilig skipakeyp og ískoytiskvotur. Meginparturin av hesum kvotum eru samsvarandi ásetingunum í § 49 lagdar um til vanligar egnar árskvotur.

4) Onnur: Kvotur, sum hava verið latnar søguligu aktørunum. Sum er, er hesin partur ikki lógarásettur, men við broytingini verður eisini hesin partur ásettur í lóg.

Tann seinna broytingin snýr seg um at javnseta *norðhavssild* við svartkjaft og makrel, tá árligu nøgdirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir eftir §§ 15 og 16 broytast. Norðhavssildin er ikki undir somu lógartreytum sum svartkjaftur og makrelur, tá heildarkvotan broytist.

Eftir ásetingunum í verandi §§ 15 og 16 er fyri øll trý fiskasløgini galdandi, at tað eru heildarkvoturnar í 2020, ið eru avgerandi fyri, hvussu árligu nøgdirnar at luta út til vinnuligar royndir og verkætlanir, fylgja broytingum í heildarkvotuni. Avgerandi er, um heildarkvotan í 2020 var niðan fyri ella oman fyri hesi mørkini ásett í lógini:

1) Svartkjaftur: 350.000 tons.
2) Makrelur: 90.000 tons.
3) Norðhavssild: 85.000 tons

Fyri svartkjaft og makrel var heildarkvotan í 2020 undir markinum, og árligu nøgdirnar av svartkjafti og makreli at býta út til rættindahavarar hava síðani verið stillaðar í sama lutfalli, sum heildarkvoturnar broytast.

Fyri norðhavssild var heildarkvotan í 2020 91.097 tons, tað vil siga oman fyri markið á 85.000 tons. Hetta ger, at um heildarkvotan av norðhavssild tey eftirfylgjandi árini er oman fyri markið, verður nøgdin av norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir, ásett soleiðis, at fyrst verða roknað 8,7% av 85.000 tonsum. Síðani verður øll nøgdin, sum er oman fyri markið og upp til heildarkvotuna í 2020, løgd afturat, eins og eitt lutfall av kvotuni, sum er oman fyri heildarkvotuna í 2020. Tí fylgir nøgdin at seta av til norðhavssild ikki árligu broytingunum í heildarkvotuni, men broytist alt eftir, hvør heildarkvotan av norðhavssild er í mun til markið á 85.000 tons og heildarkvotuna í 2020.

Tey fyrstu árini var heildarkvotan oman fyri markið og oman fyri heildarkvotuna í 2020. Men í 2024 fór heildarkvotan niður um tey 85.000 tonsini. Hetta gjørdi, at nøgdin av norðhavssild at lata til vinnuligar royndir og verkætlanir minkaði lutfalsliga meira, enn minkingin í heildarkvotuni, tí nú datt øll nøgdin oman fyri markið burtur.

Við lógaruppskotinum verður farið burtur frá hesum reglunum fyri norðhavssild. Mørkini verða tikin burtur, og nøgdirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir at luta út eftir § 49, koma frameftir at verða ásettar eftir sama leisti sum fyri svartkjaft og makrel. Við nýggju kvotulutunum er lagt upp fyri at javna út avleiðingarnar yvir eitt áramál, soleiðis at meiri verður til hesar kvotur enn eftir galdandi løgtingslóg, tá heildarkvotan er lítil, men at tað verður lutfalsliga minni til hesar kvotur, tá heildarkvotan er stór.

Stk. 1 sigur, hvussu heildarkvotan av svartkjafti verður býtt. Prosentpartarnir eru ásettir við støði í eini heildarmeting, har fleiri viðurskifti eru tikin við. Atlit eru tikin at galdandi kvotutillutingini av svartkjafti, eins og mett er um, hvussu tøka føroysku kvotan av svartkjafti væntandi fer at verða frameftir. Yvirskipað er miðað eftir, at teir fýra kvotubólkarnir í svartkjaftinum yvir eitt áramál fáa tillutað somu kvotunøgdir sum eftir galdandi lóg. Havast skal í huga, at felags kvotupartarnir ikki kunnu samanberast við teir, sum eru í galdandi løgtingslóg, tí við broytingini fevnir heildarkvotan eisini um tær nøgdir, sum í galdandi løgtingslóg verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 14, t.e. umlagdar menningarkvotur, og ta nøgd í § 14, ið ikki er løgd um, og sum verður lutað út eftir § 49 saman við teimum nøgdum, sum í dag koma frá §§ 15 og 16 í løgtingslógini. Heildin, sum kvotuparturin vísir til, er sostatt størri við broytingini enn í galdandi løgtingslóg.

Nýggju kvotupartarnir til ymisku kvotasløgini í svartkjaftinum taka støði í tí lutfalli, sum hesar kvotur í miðal hava haft av heildarkvotuni (íroknað § 14 kvotur) árini síðani 2018. Mett verður, at umstøðurnar hesi seinastu árini geva eina mynd av, hvussu umstøðurnar kunnu væntast at verða frameftir.

Í talvu 3.1. er mett um avleiðingarnar av broytingini fyri svartkjaft. Hetta er gjørt við støði í ymiskum tøkum føroyskum kvotum av svartkjafti, sum føroyska kvotan av svartkjafti væntandi fer at at vera tey næstu árini. Talvan vísir munin millum nøgdirnar at seta av til teir fýra kvotubólkarnar í býtinum eftir verandi skipan og nøgdirnar eftir uppskotinum. Vit síggja m.a., at verður føroyska kvotan 450.000 tons, fáa tey, sum hava umlagdar menningarkvotur, 2.611 tons meira at býta, enn tey høvdu fingið við galdandi løgtingslóg. § 49 kvotur og uppboðskvotur fáa nakað minni at býta, ávikavist 0,2% og 1,3% minni enn tey annars høvdu fingið. Søguligu aktørarnir fáa 2.380 tons minni at býta, sum er gott eitt prosent minni enn tey

annars høvdu fingið at býta eftir verandi skipan. Myndin broytist, um kvotan verður 500.000 tons. Tey, sum hava umlagdar menningarkvotur, fáa meira at býta, meðan øll hini fáa minni at býta. Vert er at nevna, at heildarkvotan í roknidøminum er 385.000 tons. Við einari føroyskari kvotu á 500.000 tons, hevði heildarkvotan verið 403.000 tons. Men tá heildarkvotan av svartkjafti fer upp um 385.000 tons, skal nøgdin oman fyri markið latast teimum, sum frammanundan hava lutfalsliga lítlar kvotur (sí broyting nr. 20).

**Talva 3.1. Svartkjaftur – munur millum nøgdir at luta út til ymisku kvotubólkarnar eftir verandi skipan og við broyttari lóg við ymiskum tøkum kvotum, í tonsum**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Føroyskar kvotur* | | | | | | |
| **Tøk føroysk kvota** | **200.000** | **300.000** | **350.000** | **400.000** | **450.000** | **500.000** |
| Heildarkvota eftir galdandi lóg | 122.000 | 186.500 | 225.750 | 287.000 | 323.750 | 360.500 |
| Heildarkvota við broytingini | 139.000 | 212.000 | 255.500 | 321.000 | 362.000 | 385.000 |
| *Munur millum nøgdir við verandi skipan og við broyttari lóg* | | | | | | |
| Umlagdar menningarkvotur | -1.116 | -1.310 | -679 | 2.240 | 2.611 | 2.982 |
| § 49 kvotur | 115 | 148 | 116 | -71 | -86 | -101 |
| Uppboðssølukvotur | 80 | 78 | -7 | -353 | -407 | -462 |
| Onnur | 935 | 1.105 | 595 | -1.785 | -2.083 | -2.380 |

Tølini í talvuni skulu lesast við fyrivarni og brúkast við varsemi. Talan er um eina meting við stórum óvissum. Serliga ber illa til frammanundan at siga, hvussu føroyska kvotan av svartkjafti verður tey næstu árini, og hvussu nógv av hesi kvotu vit fara at lata øðrum londum í kvotuumbýti. Søgan vísir, at hesar nøgdir broytast sjáldan í sama lutfalli, sum tøka kvotan broytist.

Stk. 2 ásetir, hvussu heildarkvotan av makreli verður býtt. Prosentpartarnir eru ásettir við støði í eini heildarmeting, har fleiri viðurskifti eru tikin við. Atlit eru tikin at galdandi kvotutilluting av makreli og metingum um, hvussu føroyska kvotan av makreli fer at vera tey næstu árini. Somuleiðis er miðað eftir, at teir fýra kvotubólkarnir yvir eitt áramál kunnu væntast at fáa tillutað somu kvotunøgdir, sum eftir galdandi løgtingslóg. Her er eisini vert at hava í huga, at kvotupartarnir ikki kunnu samanberast við teir, sum eru í galdandi løgtingslóg, tí við broytingini fer heildarkvotan eisini at fevna um tær nøgdir, sum í galdandi løgtingslóg verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 14, t.e. umlagdar menningarkvotur, eins og tað, ið ikki er lagt um, og sum verður lutað út eftir § 49 saman við teimum nøgdum, sum í dag koma frá §§ 15 og 16 í løgtingslógini.

Nýggju kvotupartarnir av makreli til ymisku kvotubólkarnar taka støði í lutfallinum, sum hesar kvotur hava av heildarkvotuni (íroknað § 14 kvotur) í 2024. Viðvíkjandi makreli verður árið 2024 mett at vera eitt hóskandi støðisár, tí føroyska kvotan í 2024 er sett innan fyri karmarnar av eini nýggjari strandarlandasemju. Henda semja ásetir ein kvotapart til Føroyar, sum er minni enn undanfarin ár, eins og ásett er, at Føroyar skulu lata øðrum strandarlandi ein part av føroysku kvotuni afturfyri atgongd at fiska makrel í teirra sjóøki. Nýggja strandarlandaavtalan hevur sostatt týdning, bæði fyri, hvussu stór samlaða føroyska kvotan fer at vera tey næstu árini, og fyri, hvussu nógv av hesi kvotu verður latin øðrum londum.

Í talvu 3.2. er mett um avleiðingarnar av broytingini. Hetta er gjørt við støði í ymiskum tøkum føroyskum kvotum av makreli. Talvan vísir munin á at seta nøgdirnar at býta millum teir fýra kvotubólkarnar eftir verandi skipan og eftir uppskotinum. Vit síggja m.a., at um

føroyska makrelkvotan er 70.000 tons, fáa tey, sum hava umlagdar menningarkvotur, 50 tons minni at býta, meðan søguligu aktørarnir fáa nakað tað sama meira at býta.

**Talva 3.2. Makrelur – munur millum nøgdir at luta út til ymisku kvotubólkarnar eftir verandi skipan og við broyttari lóg við ymiskum tøkum kvotum, í tonsum**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Føroyskar kvotur* | | | | | | |
| **Tøk føroysk kvota** | **50.000** | **60.000** | **70.000** | **80.000** | **85.000** | **90.000** |
| Heildarkvota eftir galdandi lóg | 28.950 | 35.100 | 41.250 | 47.400 | 50.475 | 53.550 |
| Heildarkvota við broytingini | 33.200 | 40.200 | 47.200 | 54.200 | 57.700 | 61.200 |
| *Munur millum nøgdir við verandi skipan og við broyttari lóg* | | | | | | |
| Umlagdar menningarkvotur | -90 | -70 | -50 | -29 | -19 | -9 |
| § 49 kvotur | -5 | -3 | -2 | 0 | 0 | 1 |
| Uppboðssølukvotur | 2 | 0 | -3 | -5 | -6 | -8 |
| Onnur | 93 | 74 | 54 | 35 | 25 | 15 |

Stk. 3 ásetir, hvussu heildarkvotan av norðhavssild verður býtt. Her eru fyritreytirnar fyri at áseta prosentpartarnar øðrvísi enn fyri svartkjaft og makrel. Fyri norðhavssild snýr lógarbroytingin seg bæði um at leggja nøgdirnar, sum í verandi lóg verða settar av í § 14, undir heildarkvotuna, og at broyta ásetingarnar, so at nøgdin, sett av til norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir, broytist í sama lutfalli, sum broytingarnar í heildarkvotuni á sama hátt sum svartkjaftur og makrelur.

Prosentpartarnir fyri norðhavssild eru settir við støði í eini heildarmeting, har fleiri viðurskifti eru tikin við. Atlit eru tikin at verandi kvotutillutingini av norðhavssild, eins og mett hevur verið um, hvussu føroysku kvoturnar fara at vera frameftir. Yvirskipað er miðað eftir, at teir fýra kvotubólkarnir yvir eitt áramál kunnu væntast at fáa tillutað lutfalsliga somu kvotunøgdir sum eftir galdandi løgtingslóg. Eisini her er vert at hava í huga, at kvotupartarnir ikki kunnu samanberast við prosentini, sum eru í galdandi løgtingslóg. Við broytingini fevnir heildarkvotan eisini um tær nøgdir, sum í galdandi løgtingslóg verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 14, men sum ikki er lagt um til vanligar egnar árskvotur, og sum verður lutað út eftir § 49 saman við teimum nøgdum, sum í dag koma frá §§ 15 og 16 í løgtingslógini.

Talva 3.3. vísir metingar av avleiðingunum av broytingini í kvotuásetingunum fyri norðhavssild. Hetta er gjørt við støði í ymiskum tøkum føroyskum kvotum av norðhavssild, sum hon væntandi fer at at vera tey næstu árini. Tølini vísa munin ímillum, hvussu nógv hvør kvotubólkur fær eftir verandi skipan, og hvussu nógv hvør kvotubólkur fær eftir uppskotinum. Av tí, at broytingin fyri norðhavssild bæði snýr seg um at samla allar kvotur undir somu heildarkvotu, og at sleppa undan serstøku sveiggjunum, knýtt at ávísum mørkum í galdandi løgtingslóg, er meiri avbjóðandi at finna ein nýggjan kvotapart, sum gevur sama úrslit sum áðrenn. Við broytingini fáa § 49 kvoturnar meiri enn tær annars høvdu fingið, tá heildarkvotan er lág, ímeðan aðrar kvotur hinvegin fáa minni. Og øvugt, so fáa § 49 kvoturnar munandi minni, tá kvotan er høg, ímeðan aðrar kvotur tá fáa meiri. Yvir eitt tíðarskeið er væntanin tó, at úrslitið útjavnar seg.

Vit síggja til dømis, at um føroyska kvotan av norðhavssild er 45.000 tons, vísir roknidømið, at 369 tons av sild eru meira at býta millum tey, sum hava § 49 kvotur. Tey søguligu (Onnur) fáa 421 tons minni at býta. Er føroyska kvotan hinvegin 120.000 tons, broytist myndin, serliga soleiðis, at nú fáa § 49 kvoturnar minni. Øll hini fáa meira at býta.

**Talva 3.3. Norðhavssild – munur millum nøgdir at luta út til ymisku kvotubólkarnar eftir verandi skipan og við broyttari lóg við ymiskum tøkum kvotum, í tonsum**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| *Føroyskar kvotur* | | | | | |
| **Tøk føroysk kvota** | **25.000** | **45.000** | **60.000** | **75.000** | **120.000** |
| Heildarkvota eftir galdandi lóg | 15.375 | 32.175 | 44.100 | 56.625 | 91.800 |
| Heildarkvota við broytingini | 17.500 | 36.000 | 49.200 | 63.000 | 100.000 |
| *Munur millum nøgdir við verandi skipan og við broyttari lóg* | | | | | |
| Umlagdar menningarkvotur | -200 | 63 | 197 | 387 | 544 |
| § 49 kvotur | 167 | 369 | 510 | 660 | -4.740 |
| Uppboðssølukvotur | 11 | -11 | -23 | -39 | 204 |
| Onnur | 21 | -421 | -683 | -1.007 | 1.992 |

Í sambandi við norðhavssild og prosentpartar er eisini vert at hava í huga, at við lógarbroytingini er markið á 85.000 tons ikki longur avgerandi fyri, hvussu nógv verður sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir og at luta út eftir ásetingunum í § 49.

**Til nr. 18**
*§ 16*
Hendan greinin verður strikað, tí við broyttu § 15 hevur hon ikki týdning longur.

**Til nr. 19**
*§ 17*
Skotið verður upp at strika hesa lógargrein. Greinin sigur, at rættindi, ið falla aftur til landið eftir lógini, kunnu setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, ella royndarfiskiskap o.a. sambært § 50. Orsøkin til at strika greinina er, at hon ikki verður mett neyðug. Verandi løgtingslóg leggur upp til at taka av allar lógarásettar skipanir, har kvotur verða latnar til vinnuligar royndir og verkætlanir. Alt, ið er latið til vinnuligar verkætlanir eftir § 49, verður sum frá líður lagt um til vanligar egnar árskvotur. Tað hevur eisini týdning at nevna, at síðani 2021 er einki latið til nýggjar vinnuligar verkætlanir eftir § 49. Harnæst verður mett, at landsstýrismaðurin longu hevur heimildirnar at luta út aftur rættindi, ið frameftir fara at falla aftur til landið, eitt nú rættindi, ið falla fyri brúksskylduni. Hesi rættindi eru vanliga knýtt at einum skipabólki, og tí talar mest fyri, at rættindini fara í felagspuljuna hjá bólkinum, tey vóru í.

**Til nr. 20**
*§ 17 a*
Stk. 1 ásetir, at um heildarkvotan er størri enn ella ájavnt við hesar nøgdir, skal landsstýrismaðurin luta út nøgdina omanfyri eftir serligum treytum:

1) 385.000 tons av svartkjafti
2) 100.000 tons av makreli
3) 100.000 tons av norðhavssild

Hetta merkir, at um heildarkvotan av t.d. svartkjafti í 2026 verður 390.000 tons, so eru 5.000 tons tøk at luta út eftir nýggju ásetingini.

Um mørkini kann sigast, at mørkini í stóran mun samsvara við mørkini í galdandi løgtingslóg, tá lagt er upp fyri, at kvoturnar í § 14 í galdandi løgtingslóg við broytingini

gerast partur av heildarkvotuni. Eisini er atlit tikið at, at kvotan av norðhavssild í 2020 var oman fyri markið, og at kvotur tí vóru latnar við støði í hesum í 2020.

Stk. 2. Hóast ásett er í stk. 1, at landsstýrismaðurin *skal* útluta nøgdirnar oman fyri markið, verður hildið, at tað skal vera møguligt hjá landsstýrismanninum undir ávísum umstøðum at gera av, ikki at luta út. Tí er í stk. 2 ásett, at sjálvt um heildarkvotan fer upp um ásetta markið í stk. 1, kann landsstýrismaðurin gera av ikki at brúka heimildina í førum, har t.d. nøgdin er lítil ella, at tað verður mett sum óskynsom gagnnýtsla av tilfeinginum yvirhøvur at luta út. Heimildin at víkja skal m.a. lesast við tí í huga, at nøgdin og mett avreiðingarvirði kann vera so mikið lítið, at umsitingarligu útreiðslurnar av at luta út kunnu vera størri enn virðið á tí, ið ætlandi skal útlutast. Í slíkum førum verða nøgdirnar oman fyri markið ístaðin útlutaðar eftir vanliga leistinum.

Verður nøgdin oman fyri markið útlutað, er hugsanin, at hetta verður sett í verk við árligu kunngerðunum fyri uppsjóvarfisk og grundað á heimildirnar í §§ 22 og 23 í løgtingslógini at skipa fiskiskap. Við hesum ber eisini til at laga útlutingina til umstøðurnar, harundir um tað t.d. er skynsamast at tilluta skipunum rættin at fiska av nøgdunum oman fyri markið, sum felagskvota, felagskvota við hámarki, ella at býtt verður javnt millum tey, ið lúka ásettu treytirnar fyri at sleppa upp í part.

Stk. 3. Ásett er, at veiðirættindi, lutað út eftir nýggju skipanini, hava gildi í upp til eitt fiskiár. Gildistíðin fær illa verið longri enn eitt fiskiár. Royndirnar vísa, at heildarkvoturnar av svartkjafti, makreli ella norðhavssild kunnu broytast nógv millum ár.

*§ 17 b*
Hendan greinin ásetir tvær treytir fyri, at eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi kann fáa lut í nøgdunum av svartkjafti, makreli ella norðhavssild at luta út sambært § 17 a.

Onnur treytin er, at bert skip við veiðiloyvi, og skip, sum við ársenda 2023, hevur rætt til kvotu av svartkjafti, makreli ella norðhavssild, ella skip, hesin rættur seinni er fluttur á, kann fáa lut í kvotunum.

Hin treytin er, at bæði tey, sum kunnu fáa lut í kvotum, og nærstandandi og onnur beinleiðis ella óbeinleiðis, ikki hava ræði á meira enn 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær. Eftir hesum ber til dømis ikki til hjá einum felagi, ið er skipað í einum samtaki, ið samanlagt er oman fyri markið, at fáa lut í kvotum sambært § 17 a. Um felag ella persónur hinvegin eigur minni enn 20% av øllum eginpeninginum í felagi, ið søkir, harundir partapeninginum, umframt minni enn 20% av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, verður ræðið hjá felagnum ella persóninum, sum eigur minni enn 20%, ikki roknað uppí tey 8%. Ætlanin við hesi treyt er at tryggja, at nøgdirnar oman fyri mørkini koma teimum til góðar, sum frammanundan hava ræði á lutfalsliga lítlum kvotum av svartkjafti, makreli ella norðhavssild.

**Til nr. 21**
*§ 22, stk. 1*
Her er talan um eina rætting, ið ikki kom við, tá greinin varð broytt í desember 2021.

**Til nr. 22**
*§ 31, stk.1, 1. pkt.*
Í galdandi løgtingslóg er “egin hjáveiðikvota” ikki nevnd í sambandi við avhending av kvotum. Tørvur er á eini áseting, sum loyvir avhending av egnari hjáveiðikvotu. Til dømis

hava Føroyar í avtaluni við Grønland í 2024 eina hjáveiðikvotu av kalva á 50 tons í fiskiskapinum eftir toski og brosmu í Eysturgrønlandi. Hendan kvotan verður býtt út á skipini, sum egin hjáveiðikvota. Mett verður, at tá toskakvota ella brosmukvota verður avhendað, eigur eisini at bera til at avhenda hjáveiðikvotu av kalva, ella at avhenda hjáveiðikvotu av kalva fyri seg, um tørvur er á tí.

**Til nr. 23**
*§ 31, stk. 2*
Við hesi broyting verða kvotur, útlutaðar eftir § 17 a, ikki tiknar við, tá myndugleikin skal kanna eftir, um 60%-brúkstreytin fyri at kunna avhenda er lokin. Orsøkin er, at hesar kvotur bert hava gildi í eitt fiskiár.

**Til nr. 24**
*§ 36, stk. 4*
Kvotur av svartkjafti, makreli ella norðhavssild, sum sambært § 17 a kunnu útlutast, tá føroyska heildarkvotan fer upp um eitt ásett mark, verða undantiknar generellu brúksskylduni. Henda skylda sigur, at um fiskifar ikki hevur brúkt rættin til egnar kvotur tvey fiskiár á rað, fellur rætturin aftur til landið.

**Til nr. 25**
*§ 41 a*
Stk. 1. Ásett er, at loyvt er at landa og avreiða 50% av veiðuni av svartkjafti, makreli ella norðhavssild uttanlands.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin fær heimild at geva undantak frá avmarkingini upp á 50% fyri fiskasløg í stk. 1, fiskaúrdráttir ella fiskiskap. Undantak kann gevast fyri eitt fiskiár ella avmarkað tíðarskeið. Í summum førum kann vera neyðugt at geva undantak frá avmarkingini um landing av uppsjóvarfiski uttanlands. Eitt nú, tá Føroyar í avtalum við onnur lond, eru gingnar undir treytir um sølu av veiðu hjá føroyskum skipum av uppsjóvarfiski. Dømi um hetta er, at tá Føroyar í 2024 gjørdu avtalu við Noreg, um at føroysk skip kundu fiska ein part av føroysku kvotuni í norskum sjógvi, var ein treyt fyri avtaluni, at allur makrelur, sum føroysk skip fiska í norskum sjógvi, skal seljast gjøgnum ella við góðkenning frá Norges Sildesalgslag. Hendan treytin ger, at makrelur, sum føroysk skip fiska í norskum sjógvi, kann verða avreiddur aðrastaðni enn í Føroyum. Tí var makrelur, veiddur í norskum sjógvi, undantikin kravinum um landing um føroyskan bryggjukant í 2024.

Stk. 3. Leggur upp til, at tá fiskifør avreiða uttanlands í ósamsvari við avmarkingina í stk. 1, skal eigarin av fiskifarinum rinda eitt gjald, sum er 30% av søluvirðinum av tí nøgd, ið er avreidd uttanlands. Hetta er sama áseting sum í § 41.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um uppgerð, gjaldfreist og rentu. Vørn ásetir avgjaldið. Er avgjaldið ikki goldið innan ásetta freist, ella onnur avtala gjørd um gjaldingina, kann TAKS innheinta gjaldið við rentu og møguligum innheintingarkostnaði við panting.

**Til nr. 26-28**
*§ 49, stk. 1, 2 og 4.*
Fylgibroytingar av broytingum nr. 15-18, har §§ 14-16 verða broyttar ella strikaðar.

Í § 49, stk. 1 verður tilvísingin broytt til ein upplýsandi tekst. Innihaldið er óbroytt, men hon vísir ikki longur til greinar, sum eru broyttar ella strikaðar.

Í § 49, stk. 2 verður líknandi broyting gjørd.

Í § 49, stk. 4, 4. pkt. verður skotið upp at strika ásetingina.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, dagfesting.

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen